



# Væleydnað útoyggjastevna









TÍÐINDASKRIV
*frá Útoyggjafelagnum*

Útoyggjastevnan í Kalsoynni 14. juni, eydnaðist sera væl.

Nógv útoyggjafólk hittust til gaman og álvara, og væl var fyriskipað. Bygdarfólk, fólk við tilknýti til bygdirnar og feløg í bygdunum løgdu stóra orku í, at alt skuldi ganga so væl, sum til bar. Ein tøkk til øll hesi fyri tað. Eisini ein tøkk til tey sum stuðlaðu tiltakið fíggjarliga.

Øll, sum komu í oynna, vóru væl móttikin, har treyt einki, og blíðskapurin var sera stórur. Tá stevnan var av, og útoyggjafólk fóru hvør til sítt, vóru ung sum gomul samd um at hittast fjølment á Útoyggjastevnu í Hesti næsta summar.

Útoyggjafelagið hevur nú uml. 200 limir. Felagið fær góða undirtøku frá fólki í øllum landinum, eins og fleiri kommunur og stovnar eru ímillum tey, ið stuðla felagið.

Ársaðalfundur felagsins var hildin í Mikladali leygardagin. Nývalda umboðsráðið avgjørdi einmælt at velja tey somu í starvsnevndina komandi skeið fram til næsta aðalfund.

Í umboðsráðnum hjá Útoyggjafelagnum sita hesi:

Laura í Frammistovu umboð fyri Kirkju og Hattarvík, Óli á Geilini fyri Svínoy, Signhild Joensen fyri Trøllanes, Ragna Glerfoss fyri Mikladal, Fríða Isaksen fyri Húsar, Poulina Eliasen fyri Syðradal, Katrina Johannesen fyri Mykines, Bjørn Patursson fyri Koltur, Sanna Silvurstein fyri Hest, Harry Jensen fyri Skúgvi, Jógvan Jón Petersen fyri Stóru Dímun.

Signhild Joensen, Trøllanes, er formaður í umboðsráðnum og Harry Jensen, Skúgvi, er næstformaður.

Í starvsnevndini sita:

Óla Jákup úr Dímun, Stóru Dímun, formaður, Esbern úr Eyðansstovu, Mykines, og Olga Biskopstø, Klaksvík.

## Útoyggjaskrivstova

Nógv umrødda útoyggjaskrivstovan sær nú dagsins ljós, men tað verður ikki við fullum seglum, sum felagið hevur lagt upp til.

Landsstýrismaðurin í útjaðaramálum, Eyðun Eltør, hevur játtað felagnum 100.000 kr. at arbeiða við í ár. Peningurin verður nýttur til at løna einum samskipara at arbeiða uml. hálva tíð, umframt til rakstur, so langt sum peningurin røkkur.

Hesin stuðul er kærkomin, tí felagið hevur nógvar arbeiðsuppgávur, umframt at fleiri verkætlanir eru undir fyrireiking. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði, sum má gerast í vanligari arbeiðstíð, og kann tí ikki bara byggjast á sjálvboðið arbeiði.

Aðalfundurin staðfesti hesa virkisætlan:

Mál at taka upp við avvarðandi myndugleikar:

- Farmaflutningurin (betur skipan)
- GSM-samskifti (at virka á øllum útoyggjum)
- Oljuspurningurin (virkin luttøka saman við kommununum á útoyggj, um at fáa skipan við oljuveiting)
- Samferðsla (framhaldandi samstarv við SL og virka fyri betri tyrlusambandi v.m)
- Samstarv við Heilsumálaráðið um ábøtur á heilsuskipanirnar

Byrja fyrireikan av størri verkætlanum:

- Framleiðsluhús (saman við m.a. Heilsufrøðiligu Starvsstovuni)
- Mentanarsøgulig landsløg (framhald av verkætlan)
- Bygdarhús verkætlan.





*Svínoyingar bjóða nú til hásummarhald í bygdini sjálvan longsta dag á árinum, leygardagin 21.06.2003. Har verður millum annað ein rulluskoytukapping á skránni, har skoytað verður eftir nýggja vegi runt um bygdina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hásummar í Svínoy

**Leygardagin skipar Svínoyar bygd fyri eini lítlari stevnu, har ymisk tiltøk verða á skránni. Rulliskoytukapping, gongutúrur í bygdini, hugnaløta og skúlabørnini fara at hava eina kiosk**

STEVNA
*Solby A. Eliasen*

Enn einaferð verður ein roynd gjørd at seta ljóskastaran á eina útoyggj. Hesaferð er tað Svínoy, sum skal setast á kortið - um ikki annað fyri eitt vikuskifti. Hugskotið til at skipa fyri einum og hvørjum eigur tilflytarin Ásmundur Guðjónsson, men hann leggur eina við, at tað eru nógv fólk uppií fyrireikingunum. Øll bygdin so gott sum er í gongd við at fyrireika alt til leygardagin, so at tey, sum koma út, kunnu fáa ein so hugnaligan og stuttligan dag sum gjørligt.

Skráin er øðrvísi enn til eina vanliga bygdastevnu, sum vit kanska kenna hana í dag. Har verður ongin kappróður ella fótbóltur. Heldur onki tivoli. Men hinvegin so skipa tey fyri eini rulluskoytukapping, sum hevur fingið heitið Svínoy Open.

Ongin handil er í Svínoy, men skúlabørnini fara at hava eina kiosk, har eitt sindur av vanligum kioskvørum verða at fáa, so sum sodavatn, slikk og franskar hot-dogs, so langt sum tað røkkur. Frá fyrireikarunum verður tí sagt, at tað er gott at hugsa um at hava okkurt við at grilla og mat annars.

Kioskin verður gjørt sum ein verkætlan í skúlanum. Tey hava bílagt vøru út, sum tey fáa í dag ella í morgin. Skúlabørnini hava sjálvi gjørt alt arbeiði og roknað út prísir og annað, sum skal gerast fyri at fáa eina tílíka kiosk at mala runt.



*Ongin handil er í Svínoy, men skúlabørnini fara at hava eina kiosk við vanligum vørum, so sum sodavatn, slikk og franskar hot-dogs*

*Mynd: Jógvan Edmund á Geilini*

## Skráin

Rulliskoytukappingin Svínoy Open byrjar leygarmorgunin klokkan 11. Tað eru Gulin og Føroya Bjór, sum stuðla kappingini. Luttakararnir verða bólkaðir eftir kyni og aldri. Skoytað verður einaferð runt nýggjaveg, sum er ein teinur upp á 1150 metrar. Kappingin verður skipað eftir cup-leistinum, og heiðursmerki verða latin.

Somuleiðis verður ein forðakapping á rulliskoytum, har forðingar verða lagdar út á útvalda vegateinin. Kappast verður upp á tíð. Tekning fer fram við Klingrugarðin, tá Másin er komin.

Klokkan 16 leygardagin verður ein gongutúru gjøgnum bygdina, har Óli í Geil fer at greiða frá ymiskum. Fyrireikararnir siga, at tað er so nógv áhugavert í sjálvari bygdini, sum flest fólk ikki vita so nógv um. So hetta varð mett at vera eitt gott høvi at kunna fáa eitt sindur av søguligari og siðsøguligari vitan um Svínoyar bygd.

Og klokkan 18 verður so ein grill tendrað, sum øll kunnu nýta. Hon kemur at standa uppi á Fløtti við akkerið.

Seinni um kvøldið um tíggjutíðina verður ein hugnaløta niðri á Helluni. Har verður felagssangur, har Sámal Ravnsfjall luttekur. Ólavur Waag Høgnesen frá Granskingardeplinum í Klaksvík fer at flyta fram hásummarrøðu, og hásummarbál verður tendrað.

Klokkan 00:30 verður ein gongutúrur niðan á Keldufjall, um veður og hugur er til tess.

## Másin eykatúr

Fyrireikararnir siga, at Másin ger tveir eykatúrar hendan dagin í sambandi við tiltakið. Ein verður klokkan 13:30 av Hvannasundi og ein av aftur Svínoy klokkan 1:30 um náttina.

– Hetta hava vit gjørt fyri,at um tað eru fólk, ið ikki ynskja at yvirnátta, so hava tey møguleika til at sleppa aftur til Klaksvíkar. Og tað var ongin trupulleiki at fáa Másan at sigla. Strandferðslan játtaði okkum hetta beinanvegin, greiðir Rakul Guðjónsson frá.

Hon sigur, at um børn ella vaksin eiga rulliskoytir, men ikki ætla at luttaka í sjálvari kappingini, so er bara at taka tær við kortini, tí umstøðurnar at standa á rulluskoytum í Svínoy sera góðar, og hon væntar, at tað fer at verða nógv gjørt av tí. Eisini eftir kappingina.

Tá tað kemur til innivist, sigur Rakul, at hon væntar, at tey flestu húsini, sum vanliga standa tóm, verða full hetta vikuskiftið, tí tað kann væntast, at nógv, sum hava tilknýti til bygdina, fara at koma út hetta vikuskiftið.

– Men um man eigur tjald og hevur hug at liggja í tí, so er bara at taka tað við, sigur hon. Veðurlíkindini lata til at fara at verða góð, so fyrireikararnir vóna tað besta.

Fyrireikararnir hava sent tíðindaskriv út, har tey millum annað siga at, hetta verður fyrst og fremst gjørt fyri at savna svínoyingar og fólk annars við tilknýti til bygdina. Men vit vóna so sanniliga, at onnur eisini leggja sær leiðina út leygardagin.

- So eftir hjá okkum svínoyingum er bert eftir førimuni at sýna blíðskap og vera í góðum hýri, soleiðis at dagurin og tiltøkini hepnast, verður sagt at enda í tíðindaskrivinum.